# Rørandi, erligt og inniligt

**Lena spældi upp á hjartastreingir, tá hon spældi eina ómetaliga erliga og rørandi konsert í Krudttønden á eystarubrúgv, í sambandi við at fløgan Can't Erase It kom á danska marknaðin.**

ÚTGÁVUKONSERT
*Orð Niels Uni Dam, nielsuni@sosialurin.fo*
*Myndir: Símun J. Hansen*

Krudttønden á eystaru brúgv í Keypmannahavn, er ikki av størstu spælistøðum, og tá Lena fór á pallin at spæla sína útgávukonsert fyri donsku útávuna av Can't Erase It, vóru hølini fullsett. Tann stóri meirilutin av áskoðarunum var føroyingar, men onkur dani, ein kanadiumaður og ein bulgari høvdu leitað sær á konsert.

### Geva Lenu eitt klemm

Konsertin gjørdist ein heit, persónlig og innilig konsert, har Lena lat upp fyri kenslunum og førdi áhoyrararnar inn í hennara heim. Onkra løtu hevði eg bestan hug at hoppa upp á pallin og geva henni eitt klemm, og aðrar løtu sat eg bara, og kendi hvussu tónleikurin fylti meg.

Fyrsta helvt av konsertini var friðsæl á onkran hátt. Við bara Lenu og Niklas á pallinum fingu løgini ein sera einfaldan búna, ið klæddi teimum. Innlivingin var stór. Millum løgini royndi Lena á donskum at siga frá søgunum aftan fyri løgini. Lena er umleið líka kring á donskum,sum Mary krúnprinsessa, og hálvbrotna málið gjørdi søgurnar um tunglyndi, ræðslu, hóttan kærleika og onnur myrk og døpur evni, enn meira hjálparleysar og syrgiligar. Løtan var innilig, persónlig og erlig á ein hátt, tú sjáldan upplivir á einum palli. Eg varð tikin við inn í heimin hjá Lenu, og har var rørandi og vakurt.

### Fullkomin framførsla

Konsertin var á tremur við góðum løgum, bæði av Can't Erase It og løg, ið ikki eru útkomin. Serliga lagið Dawn av Can't Erase It, virkaði sterkt á ein hátt, sum eg ikki havi hoyrt fyrr. Eg havi hoyrt lagið fleiri ferðir á føroysku útgávuni av fløguni, og eisini á konsertum, uttan ordiliga at festa meg við tað. Men í Krudttønden var framførslan og útsetingin av lagnum so fullkomin, at hetta gjørdist eitt av hæddarpunktunum á kvøldinum.

### Sterkar kenslur

Lagið Shimmy Shake It, snýr seg um slatur, um hvussu ilt man kann fáa av slatri og týdningin av, at bara ikki leggja nakað í tað. Hetta lag vísti eina aðra og eitt sindur skitnari síðu av røddini hjá Lenu, sum var ótrúliga lekkur. Røddin fekk eitt slag av kontrikenslu og lagið rokkaði á ein einfaldan hátt. Henda sama kontrikensla var eisini galdandi í lagnum No Emergency, ið Lena skrivaði, einaferð hon sat einsamøll í stormi og streymsliti. Í staðin fyri at vera bangin, skrivaði hon ein sang um at vera bangin. Hetta lagið hevði eitt frálíkt niðurlag.

Í lagnum Stones in My Pocket, syngur Lena "The only way I know how to live is killing me", henda regla brendi seg fastan á onkran hátt. Hetta lag hevði Lena skrivað, meðan hon hevði verið sera kedd og tunglynt, og kenslurnar í framførsluni vóru sterkar og sannførandi.

### Ein fantastisk rødd

Tittullagið av fløguni er sum lag kanska ikki besta lagið hjá Lenu. Men hetta er eitt lag, ið veruliga vísir, tær nógvu síðurnar av hennara sangrødd. Hetta ger tað til eina uppliving hvørja ferð tú hoyrir lagið. Tí røddin hjá Lenu er so fantastisk. Hon hevur so nógv egið yvir sær, og so fevnir hon so øgiliga breitt.

Eg havi tað trupult við lagnum American Dream av Can't Erase It. Hetta er eitt ordiliga gott lag, men tað tykist bara nakað so forferdiliga pínligt at syngja "Who can live the American Dream, without reaching for the stars" eg fái ikki tikið tað fyri fult - men vit eru so ymisk.

### Brøðurnir Poulsen

Miðskeiðis í konsertini var ein steðgur, og nú komu Óli og Hans Poulsen við, Óli á bass og Hans á klaver og slagverk. Hetta broytti tó ikki formin á framførsluni tað stóra, enn løgdu tey dent á at halda útrykkið nakið og einfalt, hvørki bassur, klaver ella slagverk sluppu nakrantíð langt fram í ljóðmyndina, og hetta riggaði væl. Í fyrsta og síðsta lagi Step on the Gas og Catch 22, sum í botn og grund eru rokkløg, var hjáveran hjá Óla og Hans gull verd, men í hinum løgunum kendu teir sítt pláss, og lógu sum stuðul hjá Lenu og Niklas.

### Glaðari helvt

Seinna helvt av konsertini var nógv glaðari og upplyftandi, serliga lagið Nothing Can Keep Us Apart, var jaligt og næstan festligt. Óli Poulsen floytaði á lagnum, og tyktist ordiliga við uppá tað, so tað var øgiliga fitt.

Lena helt fram við at vísa nýggjar og spennandi síðir av røddini, og á tí eitt sindur Nick Cave kenda lagnum Seasons Will Change, hoyrdu vit eina svakliga gangastara gospel rødd, sum man skuldi hildið var ómøgulig at gera live, men hjá Lenu er ivaleyst ikki so nógv ómøguligt.

### Ringdi til Yoko

Í sambandi við, at John Lennon hevði havt 65 ára føðingardag hendan mánaðin, slapp eisini lagið I Want You. Lena skemtaði, at hon hevði ringt til Yoko og spurt um loyvi um at spæla tað, og tað var í lagi. Hetta gjørdist ein Lenu útgáva av gamla Beatles lagnum, og bæði Lena og lagið klæddu hvør øðrum.

Samanumtikið var hetta ein heilt fantastisk konsert, við góðum løgum, góðum søgum framførd einfalt og vakurt og sungin av einari av teimum bestu røddunum vit eiga. Tí hóast hon er hálv úr Kanada, og er í heimsflokki, so haldi eg, at vit eiga at gera krav uppá hana sum føroying. Eins væl og danir gera krav uppá nýggja prinsin.


*Lena lat dyrnar upp til sín heim, og sum áhoyrari varð eg tikin við á eina rørandi og inniliga ferð*


*Einfaldi formurin klæddi løgunum væl*


*Tónleikararnir kendu sítt pláss og hildu seg aftur í ljóðmyndini*


*f.v. Hans Poulsen(slagverk og klaver), Lena Anderssen (rødd og gittar), Niklas Johannesen (gittar og rødd) og Óli Poulsen (bass og bríksl)*


*Konsertin var vøkur, hugnalig og innilig*


*Krudttønden er eitt lítið hugnaligt spælistað, týskvøldið var tá á tremur við føroyingum*

## Nýggj útgáva av Can't Erase It

Fløgan Can't Erase It hjá Lenu er komin í handlarnar í Danmark í hesi vikuni. Hetta er ein endurljóðblanda útgáva av føroysku fløguni við sama navni. Harumframt eru løgini I Still Love You, Oh My Lady og 20 Steps From My House eisini við. Hetta hevur havt tí avleiðing, at løgini When I'm Around You, Nothing's Gonna Bring Me Down og As Long As I've Got You er viskaði av fløguni.

## Lenamusic fingið nýtt andlit

Lena hevur fingið snøgga nýggja heimasíðu. Nýggja síðan er gjørd av illugraphic.com við Høgna Magnussen. Á síðuni er umframt tíðindi og yvirlit yvir konsertir, nógvir hentir upplýsingar, myndir, brot av løgunum á Can't Erase it, tekstir og myndir av songkvinnuni. Síðan liggur á www.lenamusic.com.

## Fløgan hesa vikuna er Can't Erase It

Fløgan hesa vikuna á Sky Radio er Can't Erase It hjá Lenu, hetta merkir at fløgan verður spæld í sendingunum, lýsingar verða sendar í sendingunum, har lurtarar fáa høvið at vinna fløgur, og harumframt verður fløgan marknaðarførd á heimasíðuni www.skyradio.dk.

Á heimasíðuni verður millum annað skrivað, at Can't Erase It er ein heilt serlig fløga, men at um tær dámar Dido, Sarah McLachlan ella Lisu Miskovsky, so er hetta ivaleyst nakað fyri teg.

Heimasíðan skrivar, at hetta er ein melankolsk fløga, tó uttan at gerast syrgiligt, tí løgini eru jalig og ljós. Fleiri av løgunum hava stórt hitpotentiali, og halda leingi. Her verða I Still Love You Baby, Step On The Gas og Oh My Lady, tikin fram sum dømi.

# Vágspoppur í Krúttunnuni

**Vit spurdu tríggjar garvaðar tónleikarar Stamen Stanchev, Kristin Bech og Sissal Kampmann um, hvat tey hildu um konsertina hjá Lenu**



***Stamen Stanchev, tangentleikari við øllum møguligum bólkum m.a. saman við Niklas í Chase***
Tað er eitt fantastiskt arbeiði, sum Lena og Niklas hava gjørt. Tey spæla Soft pop, og fara tann heilt rætta vegin. Har er einki nýtt undir sólini, men ordiliga gott og kekkað. Nú vóni eg, at management og alt sovorðið er líka kekkað. Tí tað er viktigt, at allur pakkin er líka kekkaður. So kunnu tey klára seg væl.

Men eg haldi, at sjálvt live konseptið, kundi verið betur. Tey mugu hava ordiligar livetónleikarar. Tey bæði einsamøll vóru betur enn við bólki. Hygg tildømis, at Teitur, teir eru tríggir mans á pallinum, og teir klára at fylla pallin út- har er útrykkið nógv sterkari. Eg havi einki í móti Hans og Óla, sum tónleikarar slettis ikki tað, men livekonseptið er ikki nóg gott.



***Kristin Bech, bassleikari í The Reverends og fyrrverandi í Mold***
Eg haldi, at konsertin var simpulthen ordiliga góð. Lena hevur broytt seg nógv seinastu árini, men hon er enn Lena. Eg haldi, at hesin eitt sindur einkulti stílurin passar væl til hennara. Hetta, at tað er beint fram, passar betur til Lenu og hennara løg, enn tað sum vit vanliga hoyrdu fyrr. Eg haldi kanska eisini, at tað, at tey spældu akkustiskt, hevði nógv at siga.



***Sissal Kampmann, fyrrverandi sangarinna í gentubólkinum Sox.***
Mær dámdi konsertina. Eg haldi, at hon var øgiliga autentisk. Lena er ein góður performari, er erlig og ópretentiøs, tað er ordiliga viktigt. Eg var eisini eitt sindur yvirraska av, hvussu habilur gittarleikari, hon er blivin.

Mær dámdi væl formin, at tey bæði sungu og spældu gittar, tað var hugnligt og stuttligt. Løgini vóru annars góð og melidiøs. Hetta er poppur, men poppur við einum sletti av rokki.